# Sandoyingar mistu oddasessin

**Saknurin í Eli Hentze og Tummas Paula Olsen var ov stórur hjá B71, sum fekk av at vita í Sandavági. Og tað høvið nýttu toftamenn til at seta seg aftur á oddasessin**

2. DEILD

*Jákup Mørk*

Tað varð sagt undan vikuskiftinum, at talan helst var um lykladystin í uppflytingarstríðnum hjá B71, tá teir vitjaðu í Sandavági.

Eftir javnleikin fyri viku síðani móti B68, vóru tað nú sandoyingarnir, sum lógu best fyri í uppflytingarstríðnum, og við níggju sigrum í seinastu trimum dystunum kundu teir nú einsamallir gera av, um tað skuldu verða teir, sum settu seg á beinleiðis uppflytingarsessin.

Og tað var eingin ivi um, at lykladysturin í so máta mundi vera, tá teir leygardagin skuldu á vitjan í Sandavági.

## Uppiborin sigur í Sandavági

Tað stóð tó skjótt greitt, at FS Vágar hevði lítlan hug at geva seg undir nakað yvirveldi leygardagin.

Við vindinum í ryggin fyrra umfarið, royndu teir at trýsta, men sandoyingarnir vóru tó ikki fyri nothing. Tað tóktist tó broyta dystargongdina, tá ein púrasta leysur Jákup Joensen kundi stúta hornaspark í kassan. Málið gav meira frið yvir spælið hjá heimaliðnum, sum nú av álvara legði trýst á.

Sandoyingarnir tóktust hinvegin ikki alt ov álvuligir, og spakuliga tóktist óttin at breiða seg. Millum lítið og einki vildi bera til hjá liðnum, og lítli samanhangurin í spælinum gjørdi tað eisini gjørligt hjá vertunum at halda fast um trýstið.

Og trýstið gav eisini úrslit, tá Ólavur í Ólavsstovu fangaði returbólt uttan fyri brotsteigin. Hann dró einaferð, áðrenn hann langaði til, og bólturin smoygdi sær inn um stólparótina.

Tað bar við sær, at tað vóru sandoyingarnir, sum skuldu trýsta eftir steðgin. Tað royndu teir eisini við at flyta nógv fólk fram, men samanhangurin í spælinum var framvegis lítil. Ikki minst tóktist tað tyngja liðið, at Eli Hentze var leikbannaður, eftir at hann hevði fingið ov nógv gul kort. Tað førdi við sær, at stýringin á miðvøllinum manglaði, og tí bar illa til at halda fast um nakað veruligt trýst.

Og hinvegin dusaði heimaliðið sær av álvara í kontramøguleikum. Serliga Birgir Joensen var týdningarmikil liður í hesum spælinum, og í fleiri førum gav hann viðspælarunum gyltar møguleikar, sum tó ikki vórðu gagnnýttir. Og tá Birgir móti dystarenda bara fór sjálvur allan vegin, megnaði hann kortini ikki at fáa bóltin í meskarnar handan Waldemar Nowicki.

Í yvirtíðini bar tó til. Enn einaferð var tað Birgir, sum var upphavsmaðurin, og tætt undir málinum kundi Sjúrður Ellefsen við seinasta sparkinum í dystinnum trýsta bóltin í meskarnar.

## Brennur í botninum

Tryggi sigurin hjá FS Vágum gav B68 møguleikan at taka oddasessin aftur, og hesum tóku toftamenninir av. Spenningur var ongan tíð um útfallið, tá LÍF vitjaði, og hóast vindurin var ímóti fyri steðgin, so varð dysturin í royndum og veru avgjørdur hesa løtuna.

Toftamenn skulu nú sjálvir vestur til Sandavágs, har Vágamenn ivaleyst vilja koppa næsta oddaliðnum á rað, og fær B68 bara ein javnleik í hesum dystinum, kunnu teir seta alt upp á pláss sjálvir.

Á Argjum var ein annar fyrrverandi B68'ari av álvara í fokus. Súni Fríði Barbá skeyt nevnliga fimm mál, tá AB tók ímóti botnliðnum úr Gøtu. Tað var alla tíðina væntandi, at AB her skuldi vinna ein tryggan sigur, men við sínum fimm málum er Súni Fríði nú av álvara farin at geva Clayton Soares kapping á máltindinum.

Í botninum megnaðu bæði Royn og B36 at vinna sínar dystir, soleiðis at stríðið í niðara endanum nú er harðari, enn tað nakran tíð hevur verið í ár. Royn tók ímóti HB, og har eydnaðist teimum at vinna 4-2, og við einum 2-1 sigri á Sumba helt B36 eisini fast í sínari vón um at sleppa undan at spæla um plássið í deildini. Tað er annars vert at leggja til merkis, at B36 hesa ferð hevði leitað sær styrk úr »hugnaliðnum« úr 4. deild. Fyrrverandi B36- og landsliðsliðformaðurin, Jens Kristian Hansen, var nevnliga at síggja á liðnum, og tað var eisini um reppið, at hann kom á máltalvuna.

# Landsdystur uttan Suna

Tá landsliðið týsmorgunin setir kós móti Ísrael, verður hetta uttan ein tann drúgvasta partin av ferðalagnum.

Suni Merkistein hevur síðani 1996 verið at kalla fastur fúsur hjá landsliðnum. Fyrsti útidystur hansara var í Bratislava hetta árið, tá Føroyar spældu á útivølli móti Slovakia. Fram til tá vóru tað Jógvan og Magni Arge, sum vóru fastir frásøgumenn, men við stjórastarvinum hjá Magna á Atlantic Airways, varð brádliga tørvur á nýggjum makkara til eldra Arge-mannin. Og síðani hevur Suni verið mest sum fastur makkari hjá Jógvani. Somikið fastur, at hetta verður fyrsti útidysturin í undankapping síðani 1996, at Suni ikki verður annar av monnunum við mikrofonina. Í hansara stað verður tað Hilmar Jan Hansen, sum fer at siga frá dystinum saman við Jógvani Arge, so heilt fremmandar verða røddirnar í útvarpinum kortini ikki. Hetta verður annars fyrsta ferðin, at tað verða Hilmar Jan og Jógvan, sum siga frá útidysti hjá landsliðnum. Nakrar ferðir hava teir roynt hetta á heimavølli, men tær ferðirnar, sum Hilmar Jan Hansen hevur varpað frá útidystum, hevur tað hvørja ferð verið sum vikarur hjá Jógvani.

**-mørk**



*Fyri fyrstu ferð síðani 1996 verður Suni Merkistein ikki partur av landsliðsferðalagnum, tá útidystur í undankapping stendur á skránni*

## Formula-deildin

formuladeildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 25 | 13 - 9 - 3 | 34 | 15 | 19 | 48 |
| 2 | HB | 25 | 14 - 5 - 6 | 63 | 32 | 31 | 47 |
| 3 | Skála | 25 | 12 - 10 - 3 | 52 | 28 | 24 | 46 |
| 4 | NSÍ | 25 | 12 - 8 - 5 | 48 | 38 | 10 | 44 |
| 5 | EB/Streymur | 25 | 11 - 9 - 5 | 47 | 33 | 14 | 42 |
| 6 | ÍF | 25 | 6 - 8 - 11 | 31 | 53 | -22 | 26 |
| 7 | KÍ | 25 | 7 - 4 - 14 | 34 | 44 | -10 | 25 |
| 8 | GÍ | 25 | 6 - 4 - 15 | 32 | 54 | -22 | 22 |
| 9 | TB | 25 | 5 - 6 - 14 | 26 | 47 | -21 | 21 |
| 10 | VB | 25 | 5 - 5 - 15 | 33 | 56 | -23 | 20 |

## 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 16 | 13 - 2 - 1 | 61 | 13 | 48 | 41 |
| 2 | B71 | 16 | 12 - 2 - 2 | 60 | 12 | 48 | 38 |
| 3 | FSV04 | 16 | 11 - 1 - 4 | 47 | 16 | 31 | 34 |
| 4 | AB | 16 | 10 - 2 - 4 | 42 | 32 | 10 | 32 |
| 5 | HB | 16 | 7 - 1 - 8 | 40 | 38 | 2 | 22 |
| 6 | Royn | 16 | 5 - 2 - 9 | 22 | 50 | -28 | 17 |
| 7 | Sumba | 16 | 5 - 1 - 10 | 31 | 60 | -29 | 16 |
| 8 | LÍF | 16 | 4 - 3 - 9 | 41 | 47 | -6 | 15 |
| 9 | B36 | 16 | 4 - 3 - 9 | 18 | 39 | -21 | 15 |
| 10 | GÍ | 16 | 0 - 1 - 15 | 16 | 71 | -55 | 1 |

## Sunset-kappingin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 2 | 2 - 0 - 0 | 61 | 39 | 22 | 4 |
| 2 | Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 54 | 36 | 18 | 4 |
| 3 | VB | 2 | 1 - 0 - 1 | 51 | 36 | 15 | 2 |
| 4 | VÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 74 | 71 | 3 | 2 |
| 5 | StÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 45 | 49 | -4 | 2 |
| 6 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 41 | 53 | -12 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 8 | Søljan | 3 | 0 - 0 - 3 | 49 | 91 | -42 | 0 |

## Atlantic Airways-kappingin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | H71 | 2 | 1 - 1 - 0 | 64 | 48 | 16 | 3 |
| 2 | Kyndil | 2 | 1 - 1 - 0 | 57 | 52 | 5 | 3 |
| 3 | Neistin | 2 | 1 - 0 - 1 | 53 | 49 | 4 | 2 |
| 4 | KÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 58 | 59 | -1 | 2 |
| 5 | VÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 54 | 57 | -3 | 2 |
| 6 | StÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 39 | 60 | -21 | 0 |

## Máltindarnir

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Sorin Anghel | EB/S | 16 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 15 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 13 |
| Bogi Gregersen | Skála | 12 |
| Sámal Joensen | GÍ | 11 |
| Hans á Lag | HB | 11 |
| Allan Mørkøre | B36 | 10 |
| Dan Djurhuus | VB | 10 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 7 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Óli Johannesen | TB | 7 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 6 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 6 |
| Andy Olsen | NSÍ | 6 |
| Páll M. Joensen | NSÍ | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| David Ahmed (Silla) | ÍF | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Dejan Tomic | TB | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |

## 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | B71 | 23 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 22 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 14 |
| Magnus Olsen | B71 | 12 |
| Sonny Johansen | FSV04 | 12 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 10 |
| Uni Arge | HB | 10 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 8 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 8 |
| Ovi Magnussen | B68 | 7 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 7 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 7 |
| Arnbjørn Danielsen | B68 | 6 |
| Eli Hentze | B71 | 6 |
| Kim Poulsen | FSV04 | 6 |
| John Eystberg | HB | 6 |
| Fróði Joensen | LÍF | 6 |
| Kenneth Kjærbo | Sumba | 6 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 5 |
| Jann Ingi Petersen | B68 | 5 |
| Kristian Anton Andreasen | B68 | 5 |
| Jákup Joensen | FSV04 | 5 |
| Roy Poulsen | HB | 5 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 5 |
| Gisli Sveinbjørnsson | Royn | 5 |